FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ

Vinnumálaráðið
Postboks 377
Tinganes
FO-110 TÓRSHAVN

2005 00367/48
13. FEB. 2007
HJG

**Argir, tann 09. februar 2007**
**J.Nr.: 6130-0058/2007 / 3**
**(at tilskila í svari)**

**Viðgjørt: AL**

**Tygara skriv: 200600186**

**Hoyringssvar viðvíkjandi uppskoti til løgtingslóg um kapping**

Víst verður til telduskriv frá Vinnumálaráðnum dagfest 30. januar 2007, har uppskot til løgtingslóg um kapping verður sent til hoyringar.

Fíggjarmálaráðið hevur hesar viðmerkingar:

Fíggjarmálaráðið mælir til, at neyvari verður mett um fíggjarligu avleiðingarnar fyri landið av uppskotinum, so Løgtingið betri fær tikið støðu til játtanartørvin. Av tí, at lógin ikki fær gildi fyrrenn 1. januar 2008, so skal henda meting gerast fyri 2008 og frameftir, uttan so at neyðugt er við hægri játtan í 2007 til fyrireikingar áðrenn gildiskomuna.

Vinarliga

Atli Suni Leo
*ráðgevi*